## Hans Pauli ger 10-krónu

Danski tjóðbankin hevur í sambandi 150 ára føðingardagin hjá H.C. Andersen givið út eina serliga 10-krónu. Mynturin fæst eisini í silvuri og gullið. Annað motivið á hesari nýggju 10-krónuni hevur føroyski listamaðurin Hans Pauli Olsen gjørt.

Hann hevur gjørt eitt motiv av einum fullvaksnum svana, sum speglar sær í vatninum við Bregentved Gods, har H. C. Andersen fekk íblásturin til sína heimskendu søgu,»Den Grimme Ælling«.

– Eg haldi, at spegilsmyndin er rættiliga sentral í søguni, og tí havi eg brúkt hana aftur í mínum verki. Søgan er jú um, tann vakra svanan, sum heldur seg vera ein ljótan dunnuunga, sigur Hans Pauli Olsen.

## Seks sjólátast

Farmaskipið Jøkulfell, sum er á veg til Íslands, søkkur norðanfyri Føroyar. 11 mans eru umborð, og fimm mans verða bjargaðir á lívi. Leitað varð eftir hinum monnunum, men eingin annar varð funnin á lívi. Fýra lík verða funnin, meðan tveir ikki koma afturíaftur.

Jøkulfell er heimahoyrandi í Estlandi, er skrásett á Isle of Man og hevur seinasta árið verið í sigling fyri Samskip. Manningin er úr Russlandi og Letlandi.

## Atli Dam farin

Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður, doyr 72 ára gamal. Føroyskir politikarar siga, at Atli Dam var ein álítandi, nýskapandi og miðvísur politikari, og í Danmark kenna tey eisini væl til avrikini hjá fyrrverandi løgmanni.

– Vit fara altíð at minnast Atla Dam fyri sín stóra kamp og innsats fyri at menna Føroyar til eitt vælferðarsamfelag. Hann hevði ein avgerandi leiklut í arbeiðnum at tryggja føroyska fólkinum eitt moderna vælferðarsamfelag, sigur Frank Jensen, politiskur framsøgumaður hjá danska Javnaðarflokkinum.

Atli Dam er tann politikarin, sum hevur sitið longst sum løgmaður í Føroyum.

*[ Februar ]*

# Gamla fullveldisparið aftur á Christiansborg



*Tað var einki serliga stuttligt hjá Stuttliga Flokkinum, sum fekk 306 av teimum sløku 25.000 atkvøðunum á fólkatingsvalinum, men Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg kundu fegnast um góð úrslit, og teir vórðu valdir í Fólkatingið*

**Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin vunnu kapprenningina um fólkatingssessirnar við størri muni, enn roknað varð við frammanundan. Javnaðarflokkurn misti luftina í endaspurtinum, meðan Sambandsflokkurin ongantíð kom rættiliga upp í ferð**

Fyri seks árum síðani sóust Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg ofta á Christiansborg.

Tá vóru ørindini at samráðast við donsku stjórnina um fullveldið. Buldraliga hjúnarbandið teirra millum slitnaði í 2003, og síðani hevur Fólkaflokkurin verið inn í hitanum í landsins leiðslu, meðan Tjóðveldisflokkurin hevur verið úti í kuldanum.

Nú skulu Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg aftur á Christiansborg, tí teir gjørdust vinnararnir av fólkatingsvalinum.

Javnaðarflokkurin, sum stóð væl í veljarakanningini, misti luftina í endaspurtinum og datt aftur um bæði Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Sambandsflokkurin kom ongantíð av álvara upp í ferð og fór frá at hava verið størsti flokkur á fólkatingsvalinum í 2001 til at verða fjórðstørsti flokkur hesaferð.

Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin vunnu tí valið greitt, og harvið fingu teir báðir sjálstýrisflokkarnir umboðini í danska parlamentinum.

### Profilar vórðu styrktir

Tað eydnaðist fleiri av profilunum í føroyskum politikki seinnu árini at staðfesta ella styrkja sína støðu. Størsta persónliga sigurin hevði Anfinn Kallsberg, sum fekk flestar persónligar atkvøður á valinum hesaferð og meira enn tvífaldaði sítt atkvøðutal upp í 3276. Hetta var ein stórur persónligur sigur hjá vrakaða løgmanninum hjá Fólkaflokkinum.

– Tað kom púra óvart á meg, at eg skuldi fáa so nógvar atkvøður. Eg hevði roknað við, at tað fór at vera tætt ímillum meg og Óla Breckmann, og tí hevði eg als ikki væntað hetta úrslitið, sigur Anfinn Kallsberg.

Høgni Hoydal hevur verið partur av einum tí harðasta politiska stríðnum síðsta hálva árið, men hetta gav ikki formanninum í Tjóðveldisflokkinum nakran snudd á valinum hesaferð. Hann staðfesti sína støðu við sløkum 2800 atkvøðum, og tað var ein framgongd samanborið við tað góða valið seinasta.

– Tað kendist sum ein stórur lætti, at valið varð so gott. Tað var sum ein stór byrða fór av herunum. Flokkurin hevur verið ígjøgnum eina trupla tíð, men vit fingu eina álitisváttan sum flokkur á hesum valinum, sigur Høgni Hoydal

### Profilar viknaðu

Aðrir markantir politikarar máttu taka til takkar við færri atkvøðum hesaferð. Serliga stór var afturgongdin hjá løgmanni Jóannesi Eidesgaard, men støðan hjá honum var øðrvísi hesaferð, tí hann kundi ikki taka sætið á fólkatingi, og tí valdu javnaðarfólk í størri mun onnur valevni á javnaðarlistanum.

Eisini Óli Breckmann misti nógvar atkvøður, nú Anfinn Kallsberg fekk so stóra undirtøku í Fólkaflokkinum. Fólkatingsmaðurin gjøgnum 17 ár fór úr 2335 atkvøðum og niður um túsund hesaferð.

Landsstýrismenninir stóðu seg ikki serliga væl á valinum hesaferð, og spurningurn er, um tað tænir nøkrum endamáli, at teir stilla upp til fólkatingið, um teir ikki fáa tikið sætið. Veljararnir hava í øllum førum ikki nakran serliga góðan hug at velja landsstýrisfólkini til fólkatingsvalið.

» Lat meg sláa fast, at um eg veruliga var ambitiøsur, hevði eg ongantíð komi heim aftur til Føroya. Valið at arbeiða sum lækni í Føroyum er júst at vinka farvæl til fleiri ambitiónir, sum bert lata seg gera í høgum sessum uttanlands «

*- Pál Weihe, lækni*

» Ígjøgnum eina sorg upplivir tú nakað álvarsamt í tínum lívi, sum tú ikki ert harri yvir. Ert tú tilvitað um hetta, kanst tú læra at gerast glað aftur og berjast fyri teimum tingunum, ið gleða teg «

*- Lena Lindenskov Mohr, blaðstjóri*

**Menninir hjá StÍF og kvinnurnar hjá Stjørnuni vinna gull, tá ið steypafinalurnar í hondbólti verða spældar. Silvurvinnarar gerast VÍF-menn og Neistakvinnur**